# Metz tosar um skúlaog miðlar

**– Borgarin er taparin, nú summi fjølmiðlafólk er partin upp í part við teimum, sum hava valdið, sigur Georg Metz, fjølmiðlamaður og rithøvundur, sum vitjar í Føroyum næstu dagarnar**



*Georg Metz fer á føroyaferðini hjá sær millum annað at siga sína hugsan um miðlar og makt*

VITJAN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í morgin kemur Georg Metz til landið, og næstu dagarnar fer hann at hava fyrilestrar og kjakast ymsastaðni í Havn og í Klaksvík. Tað er mentanarleiðarin hjá Klaksvíkar býráði, Dávur Winther, sum hevur fingið vitjanina í lag, og Georg Metz skal millum annað seta hol á eitt kjak um fólkaskúlan í Klaksvík. Georg Metz hevur í nógv ár verið fjølmiðlarmaður, og hann hevur eisini skrivað bøkur og hildið nógvar fyrilestrar.

### Kjak á Sosialinum

Føroyaferðin byrjar í Havn og í nýggja miðlahúsinum hjá Sosialinum, har Georg Metz og Hans Engell leygarkvøldið kl. 18.00 hava kjak um miðlar og samfelag.

– Søgurnar í samfelagnum verður nú snikkaðar til av fólki, sum eru komin úr fjølmiðlaheiminum, men sum nú eru farin upp í part við teimum, sum hava valdið. Størsti taparin av hesum er borgarin, sigur Georg Metz.

### Almennir fyrilestrar

Mánadagin hevur Georg Metz tveir fyrilestrar í Klaksvík. Tann fyrri verður í Býráðshøllini kl. 16.00, har hann fer at tosa um umsiting og miðlar. Tann seinni verður í Ósáskúlanum kl. 20.00, har hann fer at tosa um fólkaskúlan. Á hesum fundi verður eisini landsstýrismaðurin Jógvan á Lakjuni við.

Týsdagin kl. 19.30 verður fyrilestur í Norðurlandahúsinum, sum hevur fingið heitið » Det danske imperium - eller den dybe forvirring«.

Georg Metz fer av landinum aftur mikudagin.

# Tíðindi á PORTALINUM um vikuskiftið

**- og nýggjur ungdómsportalur á veg**



Í eina tíð hevur Sosialurin gjørt tíðindini til heimasíðuna hjá Føroya Tele, www.olivant.fo ella eisini betri kend undir heitinum PORTALURIN (www.portalur.fo). Hesi tíðindini hava fyri tað mesta verið gerandisdagar. Men vitandi, at heimurin ikki stendur í stað um vikuskiftini, og at nógv tiltøk fara fram kring alt Føroya land um vikuskiftið eisini hava Føroya Tele og Sosialurin víðkað samstarvið um at gera tíðindi til Portalin til eisini at fevna um alt vikuskiftið. Her fara at verða bæði føroysk og útlendsk tíðindi leygardag og sunnudag.

Umframt vanligu tíðindini røkir Sosialurin eisini heimasíðurnar Sportalurin og Pop.fo. Um stutta tíð verður Pop.fo útbygt til ein ungdómsportal. Í løtuni umrøður Pop.fo bert tónleik. Nýggi ungdómsportalurin fer at leggja dent á øll ungdómsviðurskifti. Sosialurin fer so í tilknýti til Ungdómsportalin hjá Føroya Tele 14. hvønn dag at hava ungdómssíður í blaðnum.

## Brúðarmyndir



*Øllum tykkum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 9. oktober 2004 takka vit hjartaliga.*

**Jenny og Evan**



*Ein hjartans tøll til tykkum øll, ið gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 9. oktober 2004.*

*Ein serlig tøkk til foreldur, systkin og øll sum hjálptu til at gera dagin ógloymandi.*

**Jóhanna, Jóhann, Magnus og Gutti**



*Øll sum á einhvønn hátt gjørdu okur dagarnar rundan um okra silvurbrúðleyp so varandi minnisríkar takka okur av hjarta.*

*Tykur gjørdi okur lívið ríkari.*

**Emma og Daniel Johan**